# Løgmaður ásannar vanda fyri mistøkum

**– Vit hava roynt at gera ymiskt fyri at sleppa undan, at so nógv uppskot koma í løgtingið beint áðrenn seinastu freist, men tað hevur ikki gingið sera væl við tí, ásannar Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sum heldur at trupulleikin er næstan ógjørligur at koma heilt til lívs**

TINGARBEIÐI
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað gongur út yvir kvalitetin í lógararbeiðnum, at løgtingið hevur so nógv at gera seinast í tingsetuni.

Tað sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sum heldur tað verða sera trupult at loysa trupulleikan við, at so nógv mál verða løgd fyri tingið beint áðrenn evstamark fyrst í mars mánaði.

– Øll vit av hesum, og øll siga seg vilja gera nakað við tað, men tað eydnast ikki at loysa hendan trupulleika. Og eg eri samdur við teimum, sum siga, at tað er størri vandi fyri at gera mistøk, tá ið so nógv mál skulu viðgerast innan so stutta tíð, sigur løgmaður.

### Mistøk henda

Søgan er tann sama mest sum á hvørjum ári. Løgtingið hevur eitt evstamark fyri at leggja uppskot fram, og dagarnar frammanundan 5. mars er rættilig rok í løgtinginum fyri at fáa lagt øll tey uppskotini fram, sum hava verið á veg, og sum alt í einum ikki kunna bíða longur.

– Hetta hevur verið eitt afturvendandi problem í nógv ár, og støðan er tann í sama í parlamentum aðrastaðni. Eg minnist frá mínari tíð í Fólkatinginum, at har vóru eisini sera nógv uppskot løgd fram beint áðrenn seinastu freist, og har vórðu mistøk gjørd í lógararbeiðnum, sum skuldu rættast í næstu tingsetu, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann sigur, at landsstýrið hevur roynt at gjørt nakað við trupulleikan. Á ólavsøku verður ein listi yvir uppskot, sum eru á veg, lagdur fram, og aðalráðini skulu royna at býta tingsetuna upp í tvey, so at uppskot verða løgd fram bæði áðrenn og eftir nýggjár. Harafturat eru aðalráðini biðin um at fáa eina javnari tilgongd av uppskotum í løgtingið.



*Tað gongur út yvir góðskuna í lógararbeinum, at so nógv mál verða løgd fyri løgtingið beint áðrenn seinastu freist í mars. Løgmaður heldur, at trupulleikin við teimum mongu uppskotunum er trupul at loysa*

### Gongur út yvir góðskuna

Hóast roynt hevur verið at fáa tingarbeiðið javnari yvir alla tingsetuna, so skulu tingfólkini í hesum døgum viðgera ein ørgrynnu av málum, sum vórðu løgd fram beint áðrenn 5. mars.

– Eg má viðganga, at tað hevur ikki gingið serliga væl við at bøta um støðuna, og tað áttu fleiri uppskot at verið løgd fyri tingið áðrenn nýggjár, sigur løgmaður.

– Hetta minnir eitt sindur um fólkaskúlan, har vit øll kenna til at skriva stíl í seinastu løtu, áðrenn hann skuldi latast inn. Og tað tykist verða sera trupult at loysa trupulleikan í løgtinginum, men allir partar mugu royna at gera sítt, so at tað í øllum førum verður bøtt eitt sindur um støðuna.

– Eg skilji væl tingfólkini, sum halda hetta verða skeivt, tí tað í ferðin á tingarbeiðnum verður sett so nógv upp, so gongur tað út yvir kvalitetin í lógararbeiðnum, sigur Jóannes Eidesgaard.

# Útvarpið kastar ljós yvir Mjørkadal

**Nýggj sendirøð hjá Útvarpinum fer at greiða frá søguni um Mjørkadal – alt frá politikki og útbyggingum til persónssøgur, sum hava tilknýti til Mjørkadal. Fyrsta sendingin verður sunnudagin.**

ÚTVARP
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Pálmasunnudag í 1959 kom løgmaður Petur Mohr Dam aftur av samráðingarferð í Danmark, og í Havn tók ein stórur mótmælisgonga ímóti honum.

Tað er byrjanin til søguna um hernaðarstøðina í Mjørkadali, sum Útvarpið fer at kasta ljós yvir í eini sendirøð við sjey ella átta sendingum. Fyrsta sendingin verður send pálmasunnudag og snýr seg um júst hendingina pálmasunnudag fyri 46 árum síðani.

Sendirøðin fer eisini at greiða frá politikkinum kring Mjørkadal, tosað verður við politikarar, leiðarar og fyrrverandi starvsfólk í Mjørkadali, og persónssøgur um kvinnur, sum komu heim við Mjørkadalsmanni og giftust við teimum, verða eisini at hoyra. Harafturat verður eisini tosað við børn hjá Mjørkadalsmonnum, sum greiða frá, hvussu tey upplivdu sína støðu.



*Útvarpið fer í nýggjari sendirøð at siga søguna um hernaðarstøðina í Mjørkadali, og tey fólkini, sum hava havt tilknýti til støðina á ymsan hátt*

### Fylgja slóðini

Tað er útvarpskvinnan Elin Winther Poulsen, sum hevur staðið fyri arbeiðnum at gera sendingarnar.

– Upprunaliga hugskotið eigur Gulla Øregaard. Hon hevur arbeitt við evninum í fleiri ár, og eg havi síðani arbeitt víðari við hesum og gjørt tað til eina sendirøð. Eg havi eisini fingið góða hjálp frá tíðindaleiðaranum Johann Mortensen, sum veit nógv um hernaðarmál, sigur Elin Winther Poulsen.

Sendirøðin kemur víða í og kring Mjørkadal, og slóðin verður fylgd heilt fram til okkara dagar.

Ætlanin er, at fýra sendingar verða sendar um páskirnar.

## Altjóða felag keypir Per

**Danska sjónvarpsfelagið Blu, har føroyski Per Zachariassen er ein av eigarunum, er selt til altjóða felagið FremantleMedia**



SJÓNVARP
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Felagið Blu, sum seinnu árini hevur fremsti danski framleiðarin av undirhaldssendingum til sjónvarp, er nú selt til altjóða felagið FremantleMedia.

Annar av eigarunum í Blu er føroyski Per Zachariassen, og hann hevur eisini verið ein av leiðarunum í felagnum, sum hevur skapt nógv góð sjónvarpskonsept, sum eru send í Danmark og seld til onnur lond. Eitt nú Stóra Klassafestin og Vinir fyri lívið.

Nú hevur FremantleMedia, sum er í somu vinnu, keypt ein stóran part av felagnum og ætlar sær at brúka Blu til at koma inn á norðurlendska marknaðin.

### Stjórin heldur fram

FremantleMedia hevur deildir í nógvum londum, og felagið er kent fyri sjónvarpskonsept sum Idols og sendingarnar við kokkinum Jamie Oliver.

Tað verður ikki upplýst, hvussu nógvar pengar FremantleMedia hevur brúkt fyri at keypa seg inn í felagið, men talan sigst verða um eina milliónaupphædd, sum eisini kemur gomlu eigarunum til góða.

Núverandi stjórin í Blu, Henrik Hancke Nielsen, skal halda fram sum stjóri, men hvussu støðan hjá Per Zachariassen nú er, hava vit ikki fingið uppspurt. Tað eydnaðist ikki at fáa orðið á Per Zachariassen fyrrapartin fríggjadagin.